# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eg fari ikki at biðja um tykkara stuðul eina ferð afturat. Tíðin er komin til at gevast*

*(Jacques Chirac)*

# Chirac takkaði fyri seg

**– Eg fari ikki at biðja um tykkara atkvøður eina ferð afturat, segði franski forsetin, tá hann boðaði frá, at hann gevst í politikki**



*Eftir 12 ár sum forseti og 40 ár á ovastu rók í fronskum politikki takkar Jacques Chirac fyri seg*

Boðini komu ikki óvart á fransmenn, tí tað hevur leingi verið almenn vitan, at Jacques Chirac fór ikki at stilla upp til forsetavalið í vár. Kortini var ein hátíðarligur dámur yvir løtuni, tá tann 74 ára gamli forsetin kunngjørdi avgerð sína.

Løtan á sjónvarpsskíggjanum var ikki bara hátíðarlig, men eisini álvarssom, og Chirac nýtti høvi til at nema við fleiri av teimum stóru og viðkomandi spurningunum í fronskum politikki. Hann ávaraði ímóti øllum víðgongdum kreftum og segði, at Frakland má ongantíð ganga við til nakra neyðsemju, tá tað snýr seg um rasismu ella antisemittismu.

Politiskir eygleiðarar í París siga, at Chirac bíðaði leingi við at kunngera, at hann stillar ikki uppaftur, tí hann vildi varðveita møguleikan at royna seg eina ferð afturat. Men eygleiðararnir ivast í, at hann hevði vunnið eitt val afturat, serliga eftir at fransmenn vrakaðu uppskotið um ES-grundlógina, sum forsetin var íðin talsmaður fyri.

Tann stóri spurningurin er nú, hvussu Chirac fer at brúka sína støðu til at ávirka valstríðið upp undir forsetavalið. Floksfelagið hansara, Nicolas Sarkozy, hevur ligið á odda í teimum flestu meiningakanningunum, men í seinastuni hevur sosialisturin Ségolene Royal togað inn á hann. Harafturat hevur miðvalevnið Francois Bayrou havt mundandi framgongd í seinastuni.

Tann javna støðan ger, at tann fráfarandi forsetin kann fáa ávirkan á úrslitið, skrivar Reuters úr París. Men fyribils vil Chirac ikki siga, hvønn veljararnir eiga at velja.



# Flýggja undan skógareldi

**Meiri enn 500 húski eru rýmd undan oyðandi skógareldi í Kalifornia**

Í gjárkvøldið gingu løgreglumenn á dyrnar hjá fólki í Orange County í Kalifornia og bóðu tey fara av húsum, tí vandi var fyri, at ein oyðandi skógareldur fór at breiða seg tann vegin.

Myndugleikarnir hava sent umleið 800 løgreglumenn og 800 sløkkiliðsmenn at basa eldinum, men nógvur vindur hevur gjørt tað vónleyst at steðga eldinum, skrivar AP. Harafturat er gróðurin sera turrur, og hitin um dagin er oman fyri 30 stig.

Skógareldurin kyknaði seinnapartin í gjár í Aneheim Hills, sum er einar 50 kilometrar sunnan fyri Los Angeles. Síðani hevur eldurin breitt seg til eitt øki, har nógv múgvandi fólk búgva, og sambært AP eru einstøk hús, sum kosta milliónir av dollarum, farin upp í royk.

Hinvegin hevur skógareldurin ikki kravt mannalív, men tríggir sløkkiliðsmenn hava fingið skaða.

## STUTT SAGT

### Rændi pinkubarn

Síðani leygarmorgunin hevur løgreglan í amerikanska statinum Texas leitað eftir einari kvinnu, sum rændi eitt pinkubarn av einum sjúkrahúsi í býnum Lubbock. Løgreglan sigur, at kvinnan hevði latið seg í ein búna, sum starvsfólk á sjúkrahúsinum brúka, og at eingin tí varnaðist nakað, fyrr enn ov seint var. Mamma pinkubarnið sat hjá barninum, tá tann fremmenda kvinnan kom eftir tí, men hon visti ikki betur, enn at kvinnan arbeiddi á sjúkrahúsinum. Sambært løgregluni hevði mamman ikki sæð kvinnuna fyrr, og tí heldur løgreglan, at tað var av tilvild, at kvinnan rændi júst hetta barnið.

### Vorðið sum fongur

Løgreglan í Kalifornia fekk ein heldur sjáldsaman fong um vikuskiftið. Tveir løgreglumenn, sum vóru á veg eftir motorvegnum, varnaðust ein lastbil, sum stóð heldur skeivur úti við jaðaran. Tá løgreglumenninir komu til lastbilin, vísti tað seg, at eingin var í stýrihúsinum, men bilurin hevði ikki staðið leingi, tí motorurin var framvegis heitur. Tá løgreglumenninir fóru upp á lastina, hildu teir seg kenna roykin av rúsevninum marihuana. So var, og á lastini funnu løgreglumenninir trý tons av marihuana, sum høvdu kostað góðar 100 mió. krónur á gøtuni í USA. Løgreglan sigur við AP, at hon veit ikki, hvør átti rúsevnið, men hon væntar heldur ikki, at nakað fer at gera vart við seg.

### Meiri luft

Bretska stjórnin vil nú hava landsins bileigarar at pumpa meiri luft í dekkini og at koyra alt óneyðugt skrambul úr viðførisrúminum. Endamálið við áheitanini er at skerja útlátið av skaðiligum veðurlagsgassi, og verður áheitanin fylgd, minkar útlátið hjá bretsku bilaeigarunum átta prosent um árið, sigur Gillian Merron, samferðslumálaráðharri. Bretska stjórnin hevur sett sær fyri at skerja $CO_2$-útlátið heili 60 prosent innan 2050.